# Nýggj veiða




**Nú kvoturnar eru niðurskronar og ymiskar fiskileiðir eru stongdar, eru reiðara í øðini - onkur segði herfyri at pappírini, har fiskidagarnir standa á, eru ikki verdir tað pappír, teir eru skrivaðir á. Tað sær út til at Klakkur hevur lagt um til annan fiskiskap.**

# Renn fyri lívinum

Kemur tú í neyð í Norðoyatunlinum og skalt kvika tær úr honum, so er bert at vóna, at tú ikki ert staddur soleiðis, at tú møtir hesum skeltinum. Jú, her ræður um at renna fyri lívinum – og hava góða konditión. (Kelda: www.nym.fo)




# Nýggj bók á netinum



## Bókin er komin út og liggur á netinum

# Í rangastrúpan

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

**Koyr teir heldur á tallerkin**
Sjómansbúffar á bryggjuni
Norðlýsið

**Gingið væl í 40 ár**
B68 tapti á fyrsta sinni
Dimmalætting

**Lyklaklárt felag**
EB/Streymur leingir við lyklaleikarar
Sosialurin

**Hava tey fingið breiðband?**
Fróðskaparsetrið gloppar dyr út í heim
Dimmalætting

**Virðisleysur vinningur**
At vinna eru 10 ókeypis ferðaseðlar frá Atlantic Airways
V4-lýsing

**Høgt tempo í Premier League**
Heimsins bestu løgdu frá landi við 180 km/t
Dimmalætting

**AB 11 stig, B36 43 stig**
Vit eru ikki verri enn hini liðini
AB-spælari við Dimmalætting

**Sjómenn á hjólum**
Leygardagin var sjómannadagur í Klaksvík, og hetta sást eisini aftur í ferðsluni í býnum.
Vikublaðið

# Leyst og fast um stórt og smátt

**Bjarni Djurholm hevur fullkomiliga mist JØRÐ-forbindilsi, nú skal hann yvirtaka LOFTrúmið!**

**Vit sum hava lurtað eftir almennu LOFTmiðlunum síðstu 10-12 árini føla, at Bjarni Djurholm langt síðani hevur yvirtikið almenna LOFTrúmið!**

**Fólk rýma úr samgongum, bygdarráðum og politiskum flokkum. Vit hava eftirhondini nógv politisk flóttafólk í Føroyum!**

**Kári P. Højgaard er vorðin RÚNA-bundin!**

**MANNfólkaflokkurin harmast, at Rúna Sivertsen er farin úr flokkinum!**

**Bygdarfólk halda, at Gundadalur er vorðin ein djóragarður, "White Tigers" og "Red Lions"!**

**"Black Panters" skulu døma dystin millum "White Tigers" og "Red Lions"!**

**Uppskot til fjepparanøvn: LÍF: "Green raisins", GÍ: "Yellow Seagull-chicks", B71: "Yellow sandcorn", ÍF: "Red smoke", Skála: "Orangutang"!**

Sosialurin